# Posturin altíð frammi til tíðina




*Postbilurin úr Havn á Skipanesi á veg til posthúsið í Saltangará*

*Myndir: Jens K. Vang*

**Fyri at posturin skal vera frammi á teimum ymisku posthúsunum í landinum, tá arbeiðsdagurin byrjar, er neyðugt at starvsfólkini á høvuðsposthúsinum møta klokkan 04.00 um morgunin. Vit fylgdu einum postbili á Skálafjarðarrutuni seinasta hósdag**

POSTFLUTNINGUR
*Magnus Gunnarsson*

Á høvuðsposthúsinum á Óðinshædd í Havn byrjar arbeiððsdagurin klokkan 04.00 um morgunin, og teir fyrstu bilførararnir møta hálvan tíma seinni. Tá posturin er klárur, verða búr við bræv og pakkaposti sett á tey ávísu støðini við tey nærmastu portrini, har sum bilarnir koyra út frá. Síðan verða bilarnir lessaðir og gjørdir klárir til postflutningin. Talan er um post til t.d. Vágar, Sandoynna, Skálafjørðin og til Klaksvíkar. Posturin til Suðuroynna fer um kvøldið. Klokkan 06.00 eru allir bilarnir farnir fult lessaðir avstað til tær ymisku ruturnar. Postbilarnir hava eina fastlagda rutu og fastar tíðir, tá teir skulu vera við tey ymisku posthúsini. Sum t.d. á Oyrabakka, har møta starvsfólkini kl. 6.45, og tá skal posturin longu vera har, so eingin bíðitíð verður eftir postbilinum, sum kemur úr Havn. Rutan inn á Skálafjørðin leggur fyrst at við posthúsið í Kollafirði, síðan á Oyrabakka, í Skálabotni verður posturin til Skála og Strendur avskipaður, síðan gongur leiðin til posthúsið í Saltangará, Norðragøtu, Fuglafirði og til Leirvíkar. Á øllum hesum posthúsum møta starvsfólkini til ásettu tíðina, tá postbilurin eigur at koma, og so verður farið í gongd við at skilja postin beinanvegin,og gera hann kláran til útberingina. Seinnaparturin er aftur ein ruta inn á Skálafjørðin. Á hesi rutuni kemur postur úr allari Eysturoynni, Klaksvík og Sundalagnum til Havnar til at verða sorteraður av kvøldvaktini, sum fer til hús umleið kl.22.00, tá allur posturin er sorteraður og klárur at senda avstað aftur morgunin eftir. Umframt skipspostin, koma dagliga eini tvey tons av posti sum flogpostur. Fyri at postboðini í teimum ymisku bygdunum og landpostboðini, skulu kunna bera postin út til tiðina, er tað neyðugt at starvsfólkini á høvuðsposthúsinum byrja tíðliga, og at postbilarnir halda tær ásettu tíðirnar. Postverkið eigur tilsamans 52 størri og smærri postbilar og 30 postknallertir. Sverri Viderø er deildarleiðari á flutningsdeildini hjá Postverk Føroya.



*Her verður postur umskipaður til ein annan postbil á Skipanesi. Bilførarin er Bergur Justinussen úr Havn*



*Postbilurin uttan fyri posthúsið í Saltangará*






*Posturin verður fluttur í sergjørdum postbúrum. Her er bilførarin, Bergur Justinussen, á veg inn á posthúsið í Saltangará við postinum úr Havn*

## Leitar eftir familju í Føroyum

**Ein hálvur føroyingur í Bretlandi roynir at koma í samband við familju sína í Føroyum**

LEITAN
*Heri á Rógvi*

Bill Cameron er hálvur føroyingur, men hann kennir ikki sína familju í Føroyum. Men hetta roynir hann at gera nakað við.

Sambært honum kallast mamma hansara Isa Kattrina Cameron, fødd Poulsen. Hon skal vera úr Vágoynni, dóttir Hans Poulsen.

Hon hitti pápa Bill undri krígnum, og tey fluttu til Onglands.

Bill Cameron hevur vent sær til føroyska konsulin og Sosialinum til at hjálpa sær við leitanini.

Vit hava tíðanverri ikki fingið nakra mynd frá honum, men niðanfyri kann brævið frá honum lesast.

Mamma hansara er vorðin sjúk, og hann vil siga hennara familju frá hesum. Serliga sóknast hann eftir einari kvinnu, ið kallast Hansa.

Hann heitir á fólk um at seta seg í samband við seg.

**Brævið**

Við loyvi frá Bill Cameron prenta vit her brot úr brævinum hjá honum.

»My mother is in an old folks home now and suffers from dimentia, my father died about 10 months ago, and I would like to inform any relatives she may have about her situation. It occured to me last Christmas, When my mother recieved a card from Thorshavn from a woman named Hansa, who I think was my mothers sisters daughter, and it is this woman that I would like to contact.

My mothers name is Isa Kattrina Cameron (nee Poulsen) and she came from the island of Vaag, she met my father during the war when he was serving with the British army, and they were married in the Parish church in Thorshavn on 22/05/1942.

Her father was a fisherman named Hans Poulsen and her mother was Olevine Kristine Kristiansen.

My name is Bill Cameron and my phone number is 01667 452303 my address is - 13 Shiel Square, Nairn, IV12 4SS, Scotland. or my E-mail address is billcameron0@aol.com. «